Hósdagin 7. juli kl. 14
lata vit upp í okkara
nýggju hølum

Tað er okkum ein stór gleði at bjóða tykkum øllum hjartaliga vælkomin inn á gólvið.

*Poula, Hans Petur við starvsfólki*

KLAKSVÍK vár SALTANGARÁ

Saltangará · Tel. 448392

VASTI 459010

# Pedagogar

## søkjast til frítíðarskúlan í Gøtu kommunu

Talan er um **2 pedagogstørv** á 25 tímar, tíðaravmarkað frá 11. august til 1. juli 2006.

Frítíðarskúlin er í Norðragøtu, við góðum og mennandi umhvørvi uttanum, s.s. fjørða, áin og fótbóltsvøllur. Frítíðarskúlin er opin frá kl. 10 til kl. 17, og er stongdur tá ið skúlin hevur frí. Tað eru pláss til 30 børn frá 1. og 2. flokki.

**Í dagliga arbeiðinum leggja vit m.a. stóran dent á:**

- at børn og starvsfólk trívast og eru í menning
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn
- at virða tað einstaka barni í bólkinum

**Vit ynskja:**

- at tú hevur góð samstarvsevnir
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag
- at verða við til at mynda og menna tað pedagogiska umhvørvi

**Lønarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag og fylgir lønarstiganum frá 10 til 16
Um eingin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett, sama tíðarskeið sum nevnt omanfyri.

**Meir fæst at vita**
um størvini við at ringja til Hannu E. Olsen deildarleiðari fartelefon nr. 210825 ella heima 441693.

**Umsóknir**
saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða okkum í hendi seinasta lagi týsdagin 12. juli 2005.

Sendast til:
Frítíðarskúlin í Gøtu
postboks 32
512 Norðragøta

Götu Kommuna

# DEILDARSTJÓRI
## søkist til
# ELFELAGIÐ SEV

Starvið sum deildarstjóri á Framleiðsludeildini hjá SEV er leyst at søkja til setan frá uml. september – oktober 2005.

**Starvið:**
Framleiðsludeildin hevur um hendur øll framleiðsluverkini hjá SEV.

Hesi umfata í løtuni diesel-, vatn- og vindorkuverk.

**Framleiðslan hjá SEV var í fjør hendan:**

| | |
|---|---|
| Dieselorka | 147.026 MWh |
| Vatnorka | 94.387 MWh |
| Vindorka | 567 MWh |

Mesta lastin var í fjør 41 MW í meginøkinum og 4,9 MW í Suðuroy.

Undir Framleiðsludeildini starvast umleið 50 fólk, harav meginparturin er maskinmeistarar.

Framleiðsludeildin hevur yvirskipaða ábyrgd fyri og eftirlit við rakstri av framleiðslueindunum. Tann, ið settur verður, skal hava dagligu leiðsluna av øllum uppgávunum hjá deildini, eisini nýgerð av framleiðsluverkum, undir ábyrgd yvirfyri, og saman við stjóra yvirfyri stýri felagsins. Deildarstjórin hevur skyldu at ansa eftir, at á øki deildarinnar verður fyrisiting, umsiting av virkjum og virkisarbeiðir gjørd á besta hátt og hevur ábyrgd fyri, at gjørt verður eftir teimum lógum og reglum, ið hitt almenna fyrisetur.

Starvsstaðið er skrivstovan hjá SEV í Tórshavn, men við tað, at framleiðslueindirnar eru spjaddar um alt landið, skal roknast við nakað av ferðing í arbeiðsørindum, m.a. til Suðuroyar og til útoyggjar.

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at viðkomandi hevur í minsta lagi viðkomandi verkfrøðingaprógv á sama støði sum teknikumverkfrøðingar frá donskum lærustovnum.

Arbeiðsroyndir á verkfrøðingastøði – serstakliga innan dieselmotorar - geva fyrimun.

**Lønin:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Verkfrøðingafelag.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Bjarka Hermansen, deildarstjóra ella Klæmint Weihe, stjóra, báðir á tlf. 346800.

**Umsóknarfreist v.m.**
Umsóknir skulu saman við avriti av prógvum og møguligum ummælum sendast til Elfelagið SEV, Box 319, 110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 25. juli 2005.

Tórshavn, tann 30. juni 2005

Elfelagið SEV

# Dagrøktari

## søkist at arbeiða í Oyndarfirði

Runavíkar Kommuna søkir eftir dagrøktara at byrja 15. august, ella eftir nærri avtalu.

Viðkomandi skal hava áhuga og hegni at arbeiða við børnum.

Dagrøktarheimið skal vera soleiðis innrættað, at tað er gott og trygt at spæla innan- og uttandura.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf 442059 ella 586004.

Skrivlig umsøkn skal verða okkum í hendi seinast mánadagin 25. juli 2005.

**Runavíkar Kommuna**
**Sociala deild**
**Heiðavegur 26**
**600 Saltangará**

# Frá Nes kommunu

Søkt verður eftir fólki, at gera reint í Tofta skúla.

Reingerðin er 24 tímar um vikuna (í skúlatíðini) frá 15. august at rokna.

Løn sambart sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og FKA.

Skrivligar umsóknir verða at senda til Nes kommunu, 650 Toftir, í seinasta lagið 15.07.2005 kl 12.00.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Nes Kommunu tlf. 447586.

**Nes kommuna**

# Til sølu

Citroen Xsara 2,0i 16v Stw
Koyrt 62250 km
Árgangur dec 98
Ljósagrátt metallak
El rútar
El spegl
Fjarstýrt centrallás
Klimaanlegg
Rattstýrt radio
Servica ok og tannreim útskift
Nýggj dekk og alufelgur
Rustviðgjørdur
Ein góður bilur
Prísur 94800,- kr
Bilurin kann sýggjast og roynast á verkstaðnum hjá Kollskerð á Hjalla
Myndir www.autoliner.dk ella www.kollsker.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo